

## Brittany Murphy deyð

Bert 32 ára gomul varð Brittany Murphy sunnudag funnin deyð í baðikari. Sambært TMZ var tað mamman hjá stjørnuni, sum fann hana deyða. Sambært Foxnews.com upplýsir ein talsmaður fyri sløkkiliðið í Los Angeles, Devon Gale, at alarmsentralurin hevði móttikið eina uppringin klokkan 8 um morgunin frá teirru adressu, har maður Brittnay Murphy býr. Ein sjúkrabilur varð í stundini sendur til húsini, og Brittnay Murphy bleiv beinleiðis koyrd til Cedars-Sinai Medical Center. Ávegis til sjúkrahúsið fekk hon hjartamassagu, men tá ið sjúkrabilurin kom til sjúkrahúsið, sum var langt burturi frá hennara heimi, staðfestu læknarnir, at stjørnan var slóknað.

*Lagt til rættis: Eirikur í Jákupsstovu og Jón Tórur Einarsson*

# Íløgurnar blivu til rakstur




**Reint tekniskt eru íløgurnar á fíggjarlógini minkaðar við 43 milliónum krónum og raksturin vaksin við 344 milliónum krónum, um vit samanbera fíggjarlógina 2010 við fíggjarlógina 2009. Samanbera vit við fíggjarlógaruppskotið er raksturin vaksin við 232 milliónum krónum og íløgurnar minkaðar við 125 milliónum. Hetta kemst tó í ávísan mun av, at sumt, sum varð roknað sum íløgur nú verður roknað sum rakstur**

### Meira pengar

Samlaða útreiðslan á fíggjarlógini er vaksin við næstan 94 milliónum krónum í mun til fíggjarlógaruppskotið fyri 2010, og við næstan 190 milliónum krónur í mun til fíggjarlógina 2009.

Rakstrarútreiðslurnar, sum nú eisini til dømis umfata stuðul til eldrasambýli og røktarheim, ið fyrr vóru íløgur, eru tær vaksnar við umleið 232 milliónum krónum í mun til uppskotið og við umleið 344 milliónum krónur í mun til fíggjarlógina 2009.

Nakrar íløgur, sum til dømis bjálving á umleið 10 milliónir krónur av Tinganesi, eru ikki við í hesi viðgerð.

### Fíggjarmálaráðið

Hyggja vit at fíggjarmálaráðnum, so er onki broytt uttan ein lógarbundin játtan á tvær milliónir krónur í mun til fíggjarlógaruppskotið. Hinvegin er rakstrarjáttanin hjá sjálvum ráðnum er skorin við 168.000 krónum, og tað eru játtanirnar til aðrar stovnar undir ráðnum eisini. Í upprunauppskotinum var mest talan um framskrivingar, so lítið er broytt hjá ráðnum.

### Fiskimálaráðið

Bæði í krónum og prosentum hevur fiskimálaráðið fingið størri rásarúm í mun til fíggjarlógaruppskotið og nógv afturat í mun til játtanina fyri 2009.

Hetta kemst fyrst og fremst av, at inntøkutrygdin, sum skuldi gerast ein minni útreiðsla, ongan veg er farin, umframt, at meiri verður goldið út av henni í mun til uppskotið í 2009.

Hinvegin kann eisini staðfestast, at íløgan, sum skuldi vera 20 milliónir krónur í ár, til nýtt havransóknarskip er púra burtur. Men útgerð á 1,5 millión krónur, sum skuldi vera íløga til Magnus Heinason, er flutt til rakstur.




